# Tey bestu

## 1

**Kvinnulandsliðið í hondbólti:**

Eingin hevði gjørt sær tær stóru vónirnar til føroyska kvinnulandsliðið, tá ið tær um mánaðarskiftið apríl/mai tóku lut í Challenge Trophy kappingini í Italia.

Føroysku kvinnurnar tóku tó allarflestu føroyingarnar á bóli, tá ið tær vunnu ein dystin fyri og annan eftir. Tær spældu seg heilt í finaluna, har tær tó noyddust at lúta fyri vertunum úr Italia.

Øll tjóðin fylgdi við í dystunum hjá føroyska liðnum í Italia, ikki minst takkað verið nøkrum framúr frásøgnum frá útvarpsmanninum á staðnum.

At føroyska avrikið var framúr, bleiv eisini prógvað, tá ið eitt sonevnt All-Star lið bleiv valt eftir kappingina. Tvær av føroysku kvinnunum, liðskiparin Gunnleyg Berg og Simona Hansen, blivu nevnliga valdir á hetta lið.

Kvinnulandsliðið í hondbólti er av ítróttarfjølmiðlunum valt til at hava framt ársins ítróttaravrik 2004.

## 2

**Rúni Weihe - flogbóltsspælari:**

Einasti einstaklingurin, sum hevur vunnið sær pláss millum trý tey fremstu ítróttaravrikini í 2004 er flogbóltsspælarin Rúni Weihe.

Eftir at verða fluttur til Noreg at lesa, fór Rúni at spæla flogbólt við norska liðnum Tromsø BK, og í ár hevur liðið gjørt bart í norsku kappingini og vunnið greipuna. Rúni Weihe er ein av lyklaleikarunum á suverena norska liðnum.

Harumframt hevði Rúni Weihe ein týðandi leiklut á føroyska flogbóltslandsliðnum, sum stóð seg so avbera væl í EM-undankappingini.

## 3

**HB 1 deild menn:**

Á sjálvum 100 ára degnum hjá Havnar Bóltfelag gjørdi flaggskipið hjá felagnum ikki mætari enn at vinna greipuna. Føroyameistaraheitið varð tryggjað í triðseinasta leikumfari, og hetta er triðja árið á rað, at HB vinnur FM í bestu deildini. Samstundis yvirhálaði HB KÍ sum mest vinnandi felagið í føroyskari fótbóltssøgu.

Í steypafinaluni á ólavsøku vann HB 3-1 á NSÍ.

Sum tað fyrsta føroyska liðið eydnaðist tað eisini havnarliðnum at vinna kappingina um Atlantsbikarið, tá ið teir í vár vunnu 3-1 á íslendsku meistarunum úr KR í Gundadali.

Hetta megnaravrik er so mikið sannførandi, at ítróttafjølmiðlafólkini í Føroyum hava valt.

**4**

Gunnar Dahl Olsen

**5**

Katrin Olsen

**6**

Jarnbardur-kvinnur


NÝGGJÁRS KONSERTIN 2004

í Ítróttarhøllini á Hálsi
hóskvøldið 30. desember 2004 - kl. 22.00

Bólkarnir spæla í hesi røð
KRISTLEIF ZACHARIASEN
GO GO BLUES
TÝR
PÁLL FINNUR PÁLL
TERJI RASMUSSEN BAND
DJ millum bólkarnar
DJ PÆTUR SWITCH

í forsølu 140.-
v/dyrnar 170.-

Bussar koyra
til og frá Ítróttarhøllini á Hálsi

| | |
|---|---|
| Vestmannaleiðin | 217752 |
| Vágaleiðin | 265353 |
| Eysturoyarleiðin | 505720 |

Ring og bílegg pláss í góðari tíð

Atgongumerkir
eru í forsølu á hesum støðum

3'arin í SMS
Kunningarstovan í Havn
Kiosk Vár í Runavík
Myllan í Miðvági
Shellstøðin í Klaksvík
Shellstøðin í Gøtudali
Shellstøðin við Ringvegin
Shellstøðin á Frælsinum
Shellstøðin í Vestmanna
Shellstøðin á Sandi

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR - so ert tú tryggari
Sosialurin
P/F Grannskoðaravirkið INPACT Statsaut. revisorar
HÁ-Prent
FOSS-EL Telefon 31 73 72 • Telefax 31 73 90
Shell
Restorffs
ATLANTIC AIRWAYS
KYNDIL TÓRSHAVN


